Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um fyrsta byggistig at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum
(Hægri fíggjarkarmur)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 83 frá 22. juni 2023 um fyrsta byggistig at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum verður § 1, 2. pkt. orðað soleiðis:
"Byggiútreiðslurnar kunnu í mesta lagi vera 37 mió. kr. íroknað prosjektering, ráðgeving og innbúgv, umframt útreiðslur til at gera eina heildarætlan fyri skúlabygningarnar á Frælsinum."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Samtykt á Løgtingi hin 17. mai 2024 við 26-1-0 atkvøðum.

forkvinna

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 21. mai 2024

stjóri